Neistin-H71 34-23 (17-8):

Klassamunur

Morgan Knezevic setti turbo-løðaran til í tíggju minuttir, og eftir hetta fingu hoyvíkingar ongan tíð fatur aftur á Neistanum

MANSHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað vóru tvey lið við sjálvsálitinum í lagi, sum fóru inn á vøllin í høllini á Hálsi leygardagin. Bæði Neistin og H71 høvdu fingið eina góða byrjan upp á kappingarárið, har tað bert hevði verið VÍF, sum hevði knógvað teimum, og í so máta var hesin dysturin ein uppgerð um, hvat av liðunum skuldi fylgja við í oddastríðnum.

Og tølini tala helst fyri seg í so máta. Neistin vann í øllum førum ein sera sannførandi sigur, og tað mundi vera minsti parturin av áskoðarunum, sum eftir dystin ivaðust í, at talan hevði verið um ein fult uppibornan sigur.

Hálvur hálvleikur var nokk

Fyrstu løtuna var annars ikki so nógv, sum bendi á, at talan skuldi vera um tann øgiliga munin millum liðini bæði. Kanska var tað Neistin, sum hevði tað betra spælið, men hinvegin stríddust hoyvikíngarnir óføra væl, og høvdu teir tí stutt tjóður í Neistanum.

Tað var tó ein stórur munur á liðunum báðum. Jugoslaviski Morgan Knezevic er í ár komin til Neistanum, og um miðjan fyrra hálvleik fór hann veruliga at vísa, hvør dugur var í honum. Uppskriftin var hin sama at kalla hvørja ferð. Press inn frá høgru, og tá so Kenzevic kom inn av vinstru bakki, var einki at rafla um, og hvørja ferð sat skotið dygst úti við stólparnar, uttan møguleika hjá Petur Magnussyni at verja fyri.

Stórspælið frá jugoslavanum fekk eisini ferð á restina av Neista-liðnum. Verjan riggaði til fulnar, Zeljko Jotic tók sær av tí, sum varð skotið ímóti honum, og álopsspælið gekk alsamt skjótari. Somikið væl gekst hesa løtuna, at seinastu góðu tíggju minuttirnar broyttist støðan frá 7-8 til 17-8, og so var tann dysturin í roynd og veru avgjørdur.

Og tað bendi spælið í seinna hálvleiki eisini á, at hann var. Ferðin kom ongan tíð upp á sama støði. Einamest tí Neistin nú bert skuldi koyra sigurin heim, og tá hovyíkingar heldur ikki tóktust hava orku til at hugsa um at taka teir bláu aftur. Eina mest ráddi um at fáa seinasta hálva tíman at ganga, uttan skaðar ella óneyðugar útvísingar, og heta eydnaðist sum so eisini.

Spennandi støða

Við sigrinum tók Neistin seg upp á ovastu tindarnar á stigatalvuni, har teir nú eru tvey stig undan næstu liðunum, tó at hesi hava leikt ein dyst færri enn teir bláu. Og hetta má sigast at vera ein ikki sørt hugagóð støða hjá aldursforsetanum at vera í. Undan kappingini var mest sum eitt heilt lið farið úr felagnum, og árið í ár varð mest sum sett av til at byggja eitt nýtt lið upp.

Fyri hoyvíkingar var talan hinvegin um eina staðfesting av, at tað neyvan verður í ár, at liðið fer at ota seg nærri toppinum á stigatalvuni. Tað er stutt sagt ov langt ímillum leikarar við veruligum kvalitetum til at gera seg galdandi í oddinum, og ístaðin verður talan helst um eitt stríð um at halda seg burturi frá niðasta sessinum í stigatalvuni hetta kappingarárið.

Ein hálvan hálvleik vant Neistin seg veruliga upp í bæði verju- og álopspartinum, og eftir hetta vóru hoyvíkingar ongan tíð nær námind einum stigi

Mynd: Álvur Haraldsen

Dysturin í tølum

Neistin-H71 34-23 (17-8)

Málkjúttar:
Neistin: Morgan Knezevic 10(5), Dan Thorleifsson 6, Áki Mørk 6(2), Ragnar Stakksund 5, Jón Ludvig 2, Helgi Michelsen 2, Birgir Kass 1, Rani Slættanes 1, Helgi K. Justinussen 1
H71: Halgri Dahl Olesen 5, Bárður Brimvík 4(2), Olaf Vestergaard 4, Annfinn N. Debess 4, Niels Viggo Niclasen 3, Esbern Patursson 1, Høgni M. Joensen 1, Finnu H. Petersen 1
Brotskøst: Neistin 9, H71 3
Útvísingar: Neistin 2, H71 4
Dómarar úr Tjaldur: Kári Hansen & Trygvi Mortensen

KÍF-Kyndil 29-31 (14-13):

Kyndil vann gysara

Við trimum nýggjum útlendingum á liðnum var um reppið, at KÍF koppaði Kyndli, men í seinasta enda var orkan ov lítil

MANSHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Vit skrivaðu í leygardagsblaðnum, at talan á pappírinum var um greiðan favorittleiklut hjá Kyndli, tá teir leygardagin skuldu vitja KÍF í Hoyvíkarhøllini. Samstundis skrivaðu vit tó, at nú KÍF hevði styrkt um liðið við trimum útlendskum leikarum, so kundi kortini væl vera, at teir fóru at arga nakað, og tað var júst tað, sum kollfirðingarnir gjørdu.

Fyrstu løtuna av dystinum var tað eisini so, at kollfirðingar hóttu við at gera nakað væl meira enn bert at arga. Serstakliga Damiroros, sum er nýggjru bakkur á liðnum, gjørdi akkurát tað, sum honum lysti at gera. Kyndil fekk snøgt sagt ikki steðga sterka jugoslavanum, tá hann leyp upp og hegnisliga bumbaði bóltin har, sum hann helt vera best. Og tað var sjáldan har, sum Kyndilsmálverjin roknaði við, at hann skuldi verða.

Tað er tó ein trupulleiki hjá KÍF, at tað er so stutt fráliðið, síðani nýggju menninir komu til felagið. Venjingarstøðan hjá hesum er als ikki so góð, sum hon eigur at vera, og so hvørt sum møðin fór at gera seg galdandi, byrjaði at gera seg galdandi, kom Kyndil alt meira við í dystin. Finur Hansson hevur higartil í ár verið eitt sindur upp og niður, men hesa ferð var tað fyri tað mesta uppeftir, og tá er hann ein stór hóttan móti einari og hvørjari verju í landinum.

Fyri steðgin hevði Kyndil togað seg mest sum upp á javnt, og í seinna hálvleiki hildu teir á fram við at toga. Fram móti dystarenda høvdu teir vunnið seg trý mál framum, og alt tóktist avgjørt, men tað var tó um reppið, at alt datt niðurfyri.

Upp á tveir minuttir minkaðu kollfirðingar úr 27-30 í 29-30, og tá Kyndil við 25 sekundum eftir brendi brotskast, stóð á gomlum nøglum. Finnur Hansson, sum misnýtti brotskastið, fekk tó sjálvur fatur á returinum, og tá hann varð tikin í armin, fekk liðið nýggja roynd úr sjey metrum, og hesaferð fall avgerðin.

Tá Finnur Hansson hevur ein góðan dag – so sum hann hevði leygardagin – er hann ein stórur biti hjá einari og hvørjari verju, og kanska meira enn nakar annar var hann høvuðsmaðurin aftan fyri sigurin hjá Kyndli á KÍF

Mynd: Álvur Haraldsen

Kunnu meira enn arga

Sum sagt, so argaði KÍF hesaferð, men mett eftir hesum dystinum, so kann væl henda seg, at liðið fer at gera nakað væl meira enn tað komandi mánaðirnar.

Við jugoslaviska styrkinum hevur liðið brádliga fingið tilført nakrar bakspælarar við nógvum kvalitetum, og hesir fara uttan iva at geva øllum verjum alstórar trupulleikar. Hartil hevur liðið fingið nýggjan málverja. Hetta er annars ikki tað plássið, sum liðið er veikast á, men tað vil altíð vera ein fyrimunur at hava tveir klassamálverjar at velja ímillum, og kann hetta samstundis vera við til at fáa tað allar besta fram í Óla Kristiani, er einki at ivast í, at tað skulu meira enn vanliga góð skot til, áðrenn bóltarnir fara í KÍF-meskarnir framyvir.

Fyri Kyndil vóru tey bæði stigini helst tað týdningarmesta leygardagin, og tað fingu teir so eisini. Kanska var tað eisini heppið, at liðið møtti KÍF, nú áðrenn nýggju menninir eru komnir í røttu venjingarstøðuna. Hvussu er og ikki, so helt Kyndil við sigrinum fast í góðu støðuni á stigatalvuni. Har eru teir í løtuni á fjórða plássinum, men eins og hini trý oddaliðini, so hevur Kyndil bert mist tvey stig, og tá dystartalið er ójavnt, er tað fyrst og fremst hesum, sum roknast má eftir.

Dysturin í tølum

KÍF-Kyndil 29-31 (14-13)

KÍF: Damiroros 9, Petur Martin Poulsen 6, Eddie Joensen 4, Regin Petersen 4, Mirko Milinkovic 3, Vagnur Johannsen 2(1), Kristian Madsen 1
Kyndil: Finnur Hansson 10(4), Jacob Jónsson 7, Heini Bendtsen 5, Hanus Jensen 3(1), Hans Áki Dal-Christiansen 2, Høgni Klein 2, Janus Einar Sørensen 2
Dómarar: Kristian Johansen & Sámal Hansen

Hesi stuðla mær við ferðini til Baruntse

Siggort Nielsen Byggimeistari Tlf. 214443
HJ-RØR Tlf. 216262
VEST PACK
VESTMANNA TIMBURHANDIL
Hjørleif E. Heinesen góðk. el-lnnl. Tlf. 424466
Vesturfarið
Café Bryggjan Tlf. 42 42 10
Jóni Durhuus Timburmeistari Tlf. 424473 · 223124
SP/F Røkt Heygadalur Tlf. 424545 · 224545
Grønnes
Rólant Isaksen Lastbílar Tlf. 424220 · 213220
Málarameistarin Uni Zachariasen
UNITED seafood
FØROYA BANKI
NavTech
ATLANTIC AIRWAYS

Í hesum degum klintrar tann 27 ára gamli vestmenningurin, Johnny Joensen, upp á 7.129 m høga Baruntse fjallið í Himmalaya. Hetta er samstundis atgongusedlin til - sum fyrsti føroyingur nakrantíð - at klintra uppá heimsins hægsta fjall - Mount Everest

Um nakar ynskir at stuðla ferðini er konto'in í
Føroya Sparikassa 9181-456.564.0
Føroya Banka 6460-418.854.5

Sosialurin